# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Strandferðslan og ferðavinnan í Kalsoynni

**Spurningar:**

1. Arbeiðir landsstýrismaðurin við at seta fleiri túrar inn á farleiðina í Kalsoynna?
2. Er ætlanin at broyta ásetingina um, at bólkar yvir 25 fólk ikki kunnu bíleggja pláss við Sam til og frá Kalsoynni?
3. Um ja, nær kunnu hesar broytingar væntast at verða settar í verk?

**Viðmerkingar:**
Ferðavinnan er ein týdningarmikil inntøkukelda hjá ferðavinnuaktørum í Kalsoynni, og nú eru vit við at koma í háárstíð hjá ferðavinnuni. Tað vísir seg tó at vera ein stór forðing, at ferðafólkabólkar omanfyri 25 fólk ikki kunnu bíleggja pláss, men mugu leiga bátin, um tey ynskja at tryggja sær pláss. Hetta er sera kostnaðarmikið og hevur við sær avlýsingar, ið viðføra fíggjarligt tap fyri ferðavinnuna.

Eisini túratalið hjá Sam er ein forðing fyri ferðavinnuna. Vit hava sæð, at áhugin fyri at vitja Kalsoynna er sera stórur og vaksandi. Sostatt kundi eitt økt túratal – eitt nú um vikuskiftið – havt við sær fleiri inntøkur bæði fyri ferðavinnuna og Strandferðsluna.

Fyri at fáa greiðu á, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur, og nær nakað hendir á økinum, verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 2. juni 2022**

Eyðgunn Samuelsen